VALGREINAR

Ber til at ala rekfisk?

Bjarti Thomsen
valevni sambandsflokksins í Suðurstreymi

Rekfiskur verður møguliga nýggjur alifiskur í Europa. Føroyingar kunnu verða við, tí vit hava vitan um hendan fiskin.

Rekfiskur (á enskum: wreckfish) er fiskaslag, sum livir víða um í Atlantshavi. Í okkara havøki fæst hann sjáldan, men longur suðuri eru størri nøgdir. Føroysk skip á royndarveiðu við Asorurnar hava rakt við gýtandi rekfisk.

Rekfiskur veksur skjótt tey fyrstu árini, um 1,5-2 kg hvørt ár. Á fiskamarknaðinum sunnan fyri er hann ein tann dýrast fiskurin og verður seldur fyri um 100 kr/kg.

Rekfiskur er eisini róligur fiskur og so 'selskabiligur', at hann etur úr hondunum á froskmanni. Tí er væl hugsandi, at hann kann trívast serliga væl í einum aliringi.

Í blaðnum Fish Farming International august 2003 verður sagt frá, at á royndarstovu í Fraklandi er eydnast at fáa egg (rognkorn) úr rekfiski gitin. Hetta er eitt stig á leiðini til at nýta rekfisk sum alifisk.

Hóast føroyska alivinnan í løtuni liggur í andaleypi er neyðugt at hyggja frameftir. Tað er væl hugsandi, at rekfiskur kann gerast eitt gott íkast í framtíðar alivinnu í Føroyum.

Í politikki ræður um at fylgja við og duga at seta ymiska vitan saman til eina heild. Hetta krevur hugflog, men úrslitið er, at nýggir møguleikar kunnu stinga seg upp.

Undirritaði bjóðar seg fram at skipa so fyri, at nýggir møguleikar verða troyttir til gagns fyri føroyska samfelagið. Tann 20. januar hevur tú møguleika at stuðla mær við hesi ætlan. Sí meira á www.samband.fo.

Borgarligur politikkur er trygdin

Heðin Zachariasen
Løgtingsmaður og valevni fyri Fólkaflokkin

Í Føroyum eigur tað almenna 68% av øllum partabrøvum í føroysku fyritøkunum.Hetta er alt ov stórur partur av føroyska vinnulívinum. Vit eiga at skipa soleiðis fyri, at fáa selt tær almennu fyritøkurnar. Vit mugu føra meiri borgarligan politikk, tí tað vita øll, at skulu vit hava eitt samfelag, sum skal hava eitt sunt vinnulív, mugu tær borgarligu kreftirnar koma framat, fyri at trivnaður skal verða her á Føroya landi. Vit eiga og mugu fáa fært borgarligan politikk eftir valið, fyri at hava eitt gott vinnulív, sum eisini er trygdin fyri einum góðum heilsuverki, einum góðum skúlaverki og øllum tí, sum hoyrir til eitt nútíðar vælferðarsamfelag..

Vit eiga at lata meira útlendskan kapital koma inn í landið, fyri at fáa tann prís fyri okkara almennu fyritøkur, sum hesar veruliga eru verdar. Vit eiga eisini at broyta markið fyri útlendska ognarpartinum í føroyskum fyritøkum. Markið má hækkast, um útlendingar skulu fáa áhuga fyri at keypa part av okkara fyritøkum. Sølan av almennum fyritøkum eigur at brúkast til at gjalda okkara uttanlandsskuld við. Tá skuldin er goldin, verða umleið 350 mió kr meiri eftir pr ár at reka okkara samfelag við.

Vit skulu fyrst vinna okkum figgjarligt frælsi og við tí politiskt frælsi.

Ábyrd, Álit og Áræði.
X við lista A

Sambandsflokkurin vil lata 328 miliónir til tær høgu inntøkurnar

Karsten Hansen
valevni Tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum

Sambandsflokkurin hevur boðað frá, at hann vil lækka skattin á "eykaarbeiði" niður á 40%. Tað merkir í stuttum, at skatturin av tí seinast tjentu krónini skal niður á 40% fyri allar inntøkubólkar.

Sambandsflokkurin vil ikki út við, hvussu nógv hetta kostar, og hvussu tað skal figgjast.

Men sum figgjarmálaráðharri gjøgnum seks ár, havi eg gjørt eina útrokning, sum eg tori at standa fult inni fyri. Hetta fer at kosta í minsta lagi 328 miliónir krónur!

Og uppskotið hjá sambandsflokkinum fer bert at gagna teimum ríkastu. Tað vera teir høgu inntøkubólkarnir, sum fáa allan hendan ágóðan. Eitt vanligt verkafólk fer ikki at fáa ágóða av einum slíkum uppskoti.

Sjálvur havi eg miðvíst arbeitt fyri at lækka skattin á arbeiði fyri tey lág- og miðalløntu. Vit hava seinastu 6 árini lækkað skattin munandi hjá eini vanligari verkamannainntøku.

Tí haldi eg tað vera ábyrgdarleyst at koma við einum valagni, sum skal lokka vanlig fólk at atkvøða fyri tær, men har tú gloymir at siga frá, at uppskotið fer at kosta oman fyri 300 miliónir krónur. Og har tú gloymir at fortelja, at hetta er tað mest asosiala skattauppskotið, sum enn hevur sæð dagsins ljós.

Skattapolitikkur er í stórsan mun ein spurningur um at býta byrðarnar javnt og rættvíst. Og at hava eitt samfelag, har tær breiðastu herðarnar bera meira enn tær smalru.

Uttan mun til, hvør roknar uppá uppskotið hjá sambandsflokkinum, so kann tað í hvussu er staðfestast, at pengarnir fara beinleiðis til tey, ið hava hægri inntøkur.

Tí spurninginum kann Sambandsflokkurin ikki renna undan við at vísa til loyniligar útrokningar.

Hinir flokkarnir og fjølmiðlarnir eiga at kunna krevja eitt svar uppá hetta frá Sambandsflokkinum.

Góðar miðnámsútbúgvingar Ókeypis frálærutilfar

Kári Mortensen
valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Miðnámsútbúgving skal vera almennandi og lestrarfyrireikandi. Galdandi skipan við studentaskúla/HF-skeiði, handilskúla og tekniskum skúlum er góð, og tað er skilagott at menna hesar skúlar hvønn sær, bæði við atliti til okkara egna samfelag og til umheimin.

So hvørt, sum tørvur er á nýggjum læruøkjum ber væl til sum higartil at stovna nýggj fak á verðandi skúlum.

Ein miðnámsútbúgving kostar í bókum og aðrari neyðugari útgerð til frálæruna einar 8.000 kr.

Hetta er munandi upphædd hjá nógvum næmingum. Javnaðarflokkurin hevur sum mál, at næmingarnir skulu fáa ókeypis frálærutilfar.

Saman við útbúgvingarstuðlinum skal hetta javnstilla næmingar, gera tørvin á frítíðararbeiði minni og geva næmingum meiri tíð til fyrireiking og til at røkja møgulig frítíðaráhugamál.

Frálæruhættirnir broytast skjótt í hesum døgum. Teldutøknin, hugtakið "ábyrgd av egnari læring" og onnur individualisering ger tørvin á persónligari vegleiðing og stuðli sentralan á miðnámsskúlunum.

Tilboð um lestrarvegleiðing og persónliga vegleiðing/stuðul skulu tí vera góð og tørvur er eisini á at fáa sálarfrøðing knýttan fast at miðnámsskúlunum.

Miðnámsskúlarnir, sum allir aðrir almennir stovnar, hava nú í nógv ár stríðst við trongar játtanir.

Av játtanini fara eini 90 % til lønir, meðan 10 % eru til rakstur.

Tá ið lønarútreiðslurnar eru fastar merkir ein niðurskurður í játtanini til ein stovn, at bert rakstrar- og viðlíkahaldsupphæddin verður skerd.

Hetta rakar sum vituligt er hart.

Sigast kann, at ein lutfalsliga lítil sparing hevur eina stóra negativa ávirkan. Heldur eigur nóg mikið av peningi at setast av til rakstur og viðlíkahald. Leiðsla og starvsfólk kunnu tá nýta sín serkunnleika og skapandi evni til góða frálæru og trivna.

Á henda hátt fær alt samfelagið nógv meiri burturúr:

Vel Javnaðarflokkin - nakað fyri C.

Tit skulu ikki vera gloymd

Jakob Holm
valevni Sambandsfloksins í suðurstreymi

Vit mugu ikki gloyma tey eldru í samfelagnum. Tað er jú tey sum hava lagt lunnar okkara vælferðarsamfelag, sum fullveldissamgongan er við at forkoma okkum.

Tey gomlu í samfelagnum skulu ikke føla, at tey eru ein byrða í samfelagnum, ella eru til ampa. Nei tey skulu føla at tað eisini er plass fyri teimun.

Sambandsflokkurin vil framhaldandi arbeiða fram ímóti, at tryggja rættindini og vælferðina hjá pensionistum okkara, tí vit meina at ríkisfelagsskapurin skapar tryggleika og møguleikar til gagns fyri Føroya fólk eldri sum yngri.

1. Heimarøktin skal virka betri t.v.s., fyri at nøkta tørvin má samstarvið millum land og kommunur virka betri.
2. Tey skulu hava loyri til at velja, um tey hava hug at arbeiða aftaná tey eru fylt 67 ár, uttan at hetta rakar pensiónina.

Við at vera í ríkisfelagsskapinum, fáa vit eina betri trygd, størri framburð og ikke minst betri vælferð.

Farið á val og seti x við lista B.

Gott val

VALGREINAR

SEV á pínubeinkin - mótmælini munaðu

Klæmint Olsen
valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy

Valevnini í Eysturoy gjørdu sína skyldu í framløgusendingini hóskvøldið í sjónvarpinum. Eiði 2 verkætlanin kemur ikki í gongd í bræði - um nakrantíð. Politisku umboðini vóru tó ikki øll líka avgjørd. Øssur noyddist at toga eitt sindur. Men eg haldi, at niðurstøðan var greið: Umhvørvið má fyrst kannast.

So nyttaði tað kortini. Tað nyttaði hjá okkum í minnilutanum í umboðsnevnd SEV's at muta ímóti. Og tað nyttaði hjá tykkum, sum í lesarabrøvum og á annan hátt mótmæltu. Takk fyri! Tit hava bjargað áunum í syðru helvt av Eysturoy - í øllum førum nøkur ár afturat.

Nógv tykjast at halda, at SEV rætt og slætt kann fara í holt við Eiði 2, so skjótt sum friðingarmyndugleikarnir hava givið sítt loyvi. Í hesum sambandi er syrgiligt at staðfesta, at hvørki friðingarmyndugleikin í Eysturoy ella landsfriðingarmyndugleikin hava trupulleikar við at geva sítt vælsignilsi til inntrivini í náttúruna.

Men so lætt spælir klaverið ikki. Landsmyndugleikin skal fyrst góðkenna Eiði 2 og Eiði 4, tí í monopol-loyvinum hjá SEV er tað eitt krav, at landsmyndugleikin skal meta um allar størri verkætlanir. Upprunaliga loyvið til Eiðis ætlanina frá 1983 var einans givið til Eiði 1 og Eiði 3, og hesar verkætlanir eru avgreiddar.

Eg endurtaki: Loyvi er ikki givið til Eiði 2..

Harumframt er krav, at landsmyndugleikin skal geva loyvi til, at SEV tekur upp lán. Í sambandi við Eiði 2 er lániumsóknin 140 mió. kr, men um Selatrað verður tikið við (viðkan av Eiði 2), verður helst talan um einar 180 mió.

Siðvenjan hevur tó verið, at SEV fær sín vilja. SEV fær sína góðkenning frá landsmyndugleikunum uttan hóvasták. Tí landsmyndugleikin hevur ikki førleika at meta um verkætlanina. Hvørki búskaparliga, tøknniliga ella umhvørvisliga.

Nógv halda eisini, at tað er SEV, sum einsamalt avger, hvussu nógv streymurin skal kosta. So er ikki. Landsmyndugleikin goðkennir á hvørjum ári streymprísin.

Veruleikin er so statt tann, at politikkararnir saktans kunnu blanda seg í avgerðir SEV's, men at teir ikki gera tað.

Tað er næstan sum lundi á jólanátt at hoyra um umhvørvisspurningar á løgtingi.

Hugsa um tað tann 20. januar 2004.

Umstøðurnar hjá barnafamiljum

Pauli Poulsen
valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy

Sjálvstýrisflokkurin leggur dent á, at hornasúlan í samfelagnum er familjan, sum støðan er í dag hava barnafamiljurnar trong kor í okkara samfelag. At seta búgv er ógvuliga tungt, og tí vil Sjálvstýrisflokkurin halda fast við at rentustuðulin ikki skal lækka.

Skulu allir bólkar hava sømulig kor, so er neyðugt í størri mun enn higartil, at ynski hjá Sjálvstýrisflokkinum, um at fáa ein virknan familjupolitikk settan á dagsskrá verður framdur í verki.

Skulu øll hava møguleika at fáa børn síni ansaði, so eiga vit í størri mun hyggja uppá gjøldini fyri ansing, sum í dag eru yvaleysa høg.

Sjálvstýrislokkurin hevur í síni valskrá, a vit skulu ikki taka meira inn frá borgarunum enn hægst neyðugt, og at skattur og avgjøld ikki skulu forða fyri arbeiðs- og framleiðsluskapandi fyritaksemi hjá tí einstaka, og at rationaliseringar skulu gerðast, sum við tíðini kunnu vera við til at lækka persónliga skattin.

Hetta eru tídningarmikil mál, sum Sjálvstýrisflokkurin vil verða við til á ávirka rætta vegin.

Set X við lista D

Høgna'sa vallyfti

Súsanna Dam
valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Las í morgum eina grein hjá formanni tjóðveldsfl. Svart samband ella frælsframtíð, og má eg siga, at eg helt hana ikki verða rættsiktaða fyri at siga tað milt, og sera lítið sømilig fyri ein - helt eg - seriøst arbeiðandi politikkara, enntá formaður í næststørsta flokkinum. Ein rúgva av lyftum, Tey flestu hevur hann slett onga ávirkan á.

Høgni Hoydal lovar nemliga, at hitt svarta sambandið fer at føra politikk við grønum keksum og bommum. Sum eg minnist, eru bert tveir mánaðir síðani at figgjarmálaráðharri Tjvlds ætlaði at figgja hin sjálvberandi búskapin við júst hesum tilfari.

At vit fara biddaragongd á Christiansborg. Nú eru longu farin meira enn 10 ár síðani hinar víðagitnu biddaragongdirnar niður á Christiansborg, og onkur hevur kanska gloymt, men eg má melda, at sambandsfl. ikki var við.

Han lovar at sambfl fer at lima okkum endaliga inn í danska ríkið, sum so aftur fer undir ES-grundlóg. og vit verða útjaðari ikki bert í Danmark, men eisini í ES. Útjaðari eru vit, tað kunnu vit ikki lúgva okkum undan, men fyrsta grein í stevnuskránni ásetur, at sambfl arbeiðir fyri frílyntari og figgjarligari menning av Føroyum innanfyri ríkisfelagsskapin.

Høgni Hoydal hevur eisini lyfti til veljarar úr øðrum flokkum, og tað er, at sambandsflokkurin fer draga allar hinar flokkarnar eftir hárunum undir hesa ørmundarstøðu, um hann vinnur valið.

Harafturímóti um tjóðveldisflokkurin vinnur ja so, halda vit fram á fullveldisleið, undir føroyskari grundlóg, har staðfest verður hvørji rættindi og skyldur, vit øll skulu hava í Føroyum.!! Ljóðar mest sum ein fjálturstungin, heimleys sál, sum einki tilverugrundarlag veit sær.

Hann lovar fólkaatkvøðu um grundlógina, ja tað plátuna hava vit hoyrt áður, uttan at tað gjørdi nakran mun.

Hann lovar at yvirtaka øll mál, halda fast um sjálvberandi búskapin og stuðningsfría vinnu. Til tess er bara at siga, at fullveldissamgongan kundi ikki semjast um eina figgjarlóg áðrenn tær kostnaðarmiklu yvirtøkurnar, og at fráboðaða avgjaldið á grønum keksum og bommum kundi heldur ikki figgja tað, sum longu er yvirtikið. Eg kundi havt hug til at sissa Høgna Hoydal og siga honum, at førdi politikkurin hevur gjørt, at ein partur av vinnuni skjótt verður burtur, so her fer ikki at tørva stuðningur.

Álvaratos, kundi ein ikki vænta at sjálvur fullveldisgeneralurin hevði okkurt annað at bjóða.

Heppið hevði verið at frætt um, hvussu teir fara at umsita gjaldoyraskipanina og figgjarmálini, sum teir skulu yvirtaka um eitt hálvt ár. Hvør skal vera figgjareftirlit?

Hvussu ætlar tjóðveldisflokkurin at skipa sosialverkið undir tí sjálvberandi frælsu figgjarlógini, sum fer at virka í summar. Ella løgregluna og dómsvaldið, onkrar ítøkiligar ætlanir mugu vera, nú so stutt áðrenn. Fryktandi er fyri at hesir spurningar ikki kunnu svarast nøktandi við mótspurninginum um, at sambandflokkurin ikki hevur álit á okkara raska og dugnaliga fólki, sum býr fram við sjóvarstrond í hesum vakra landinum.

Ein nýggjur vinnaramentalitetur

Rani Nolsøe
valevni Tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum

Viljin til sjálvbjargni hevur lyft Føroysku tjóðina inn í 21. øld á einum nýggjum avgerandi grundarlagi.

Tað er hent, eftir at vit loksins tordu at trossa danska sambandið og settu eina sjálvbjargnisstjórn við ræði bæði í 1998 og 2002.

Og tað ber boð um ein dýrkeyptan lærdóm.

Ein lærdóm sum vísur, hvussu gali tað gekk, tá vit lótu ábyrgdarleysar polittikarar korrumpera okkara samfelag og sum goldu rokningina við blokkstuðli og altjóða lánum.

Eitt túsund og trí-hundrað miljónir seinni máttu føroyskir politikkarar standa skúlarætt á Christiansborg og góðtaka harðar treytir fyri teirra kreppuloysnir. Sum tað var stýrt, hava vit ongan annan enn okkum sjálvi, at skjóta ábyrgdina eftir.

Men síðani vit settu sjálvstýrið á rætta kós í 1998, hevur ein nýggjur vinnaramentalitetur spreitt seg í Føroyska samfelagnum, sum vit ikki áður hava sæð.

Hendan vinnaramentalitet síggja vit í vinnulívinum, sum ruddiliga hevur prógvað, at vit eru eitt moderna ídnaðarsamfelag, sum byggir á vinnuligar realitetir og ikki korruptar hvørvisjónir í gamla plánbúskapinum.

Politiskt hava vit hildið tørn við eini avgjørdari búskaparstýring, sum hevur tryggjað, at menningin í samfelagnum er farin fram í eini ábyrgdarfullari sosialari javnvág.

Úr hesum sunna jørðildi er ein nýggj vinnaramentan risin, sum okkara listarfólk, tónleikarar, telvarar og ítróttarfólk yvirhøvur, hava borið út í heim.

Alt hetta er nýggja myndin, sum altjóða samfelagið hevur av Føroyum í dag.

Latið ikki hesa dýrabæru íløgu í okkara framtíð fara fyri bakka 20. januar.

Gevið Tjóðveldisflokkinum framhaldandi mandát at føra eina avgjørda búskaparstýring eftir hesum greiða málsetningi og latið landið blóma mentannarliga.

Tá er tað bert hóttanin um fortíðarpolitikkin hjá sambandskreftunum, vit hava at óttast.

Standið saman um nýggja vinnaramentalitetin! Hann hevur verið okkum dýrkeyptur.

Veljið framtíðina - veljið Tjóðveldisflokkin.